# Viðtøkur fyri
# Betri Trygging P/F

## I. NAVN, HEIMSTAÐUR OG ENDAMÁL

**§ 1**

**Stk. 1.** Navn felagsins er partafelagið Betri Trygging við hesum hjánøvnum

Betri Tryggingarfelag
Tryggingarfelagið Føroyar / TF
Tryggingarsambandið Føroyar / TF
Føroya Sjóvatrygging / FS
Føroya Brunatrygging / FB
Føroya Vanlukkutrygging / FV
Krígstrygging fyri føroysk fiskifør / KFFF
Føroya Endurtryggingardeild / ET
Faroe Marine Insurance Co.
Faroe Insurance Co.
Tryggingin
Tryggingarmiðstøðin

**Stk. 2.** Heimstaður felagsins er Tórshavnar kommuna.

**Stk. 3.** Endamál felagsins er at reka tryggingarvirksemi, sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi tryggingarlóggávu, herundir endurtryggingarvirksemi, undantikið lívs- og eftirlønartrygging. Eisini kann felagið reka umboðssølu fyri tryggingarfeløg, byggja, eiga og reka fasta ogn sum varandi peningaíløga, umframt annað virksemi, ið má metast at hoyra til felagsins tryggingarvirksemi.

## II. PARTAPENINGURIN

**§ 2**

**Stk. 1.** Partapeningur felagsins er kr. 400.000.000,-.
**Stk. 2.** Partarnir eru kr. 1.000,- til støddar ella multipli av hesum.

**Stk. 3.** Eingi partabrøv hava framíhjárættindi.

**Stk. 4.** Partabrøvini skulu ljóða uppá navn.

**Stk. 5.** Partaeigararnir hava onga skyldu til at lata partabrøv síni innloysa.

**Stk. 6.** Hvør avhending av partabrøvum skal skilast til í bókum partafelagsins.

**§ 3**

Partabrøvini kunnu frítt verða seld.

## III. FRÁBOÐAN

**§ 4**

**Stk. 1.** Boð frá partafelagnum til partaeigararnar skulu sendast hvørjum einstøkum skrivliga til tann bústað, ið seinast er skrivaður í partabrævabókina ella við lýsing í almennum føroyskum lýsingarblaði.

**Stk. 2.** Forsónast partabræv, kann nevndin, um hon verður biðin um tað, fáa tað gjørt deytt og virðisleyst eftir teim reglum, sum ásettar eru í vinnufelagslógini um mortifikatión av partabrøvum.

## IV. AÐALFUNDURIN

**§ 5**
Aðalfundurin verður skipaður av partaeigarum, ið hava eina atkvøðu fyri hvønn part uppá kr. 1.000,-. Partarnir skulu verða innskrivaðir í partabrævabók felagsins seinast ein mánað, áðrenn aðalfundurin verður hildin, fyri at geva atkvøðurætt.

**§ 6**
Nevndin boðar til aðalfund á heimstaði felagsins við tilskilan av tíð, stað og dagsskrá í minsta lagi 14 dagar og í mesta lagi 4 vikur frammanundan aðalfundin, hetta við skrivliga at venda sær til hvønn einstakan partaeigara á tí bústaði, ið seinast er skrivaður í partabrævabókina ella umvegis heimasíðu felagsins.

**§ 7**
Allir partaeigarar hava rætt at fáa ávíst evni viðgjørt á ársaðalfundinum. Uppskotið skal verða latið felagnum seinast 6 vikur áðrenn aðalfundin. Er uppskotið komið seinni enn 6 vikur áðrenn aðalfundin, kann nevndin tó avgera, at uppskotið er komið í so góðari tíð, at uppskotið kortini verður viðgjørt á ársaðalfundinum.

**§ 8**
Vanligur ársaðalfundur verður hildin á hvørjum ári fyri 1. juni til at viðgera.

1. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Avgerð um hvussu møguligt avlop ella tap, sambært roknskapinum, verður nýtt.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av grannskoðarum – sí § 21.
6. Møgulig uppskot, ið nevndin ella partaeigararnir ynskja at viðgera.
7. Ymiskt

## V. EYKAAÐALFUNDUR

**§ 9**
Eykaaðalfundur verður lýstur, tá ið stjórnin, nevndin, ein aðalfundur ella grannskoðari vil, ella tá ið partaeigarar, ið tilsamans eiga 1/20 av partapeninginum, skrivliga krevja tað til at viðgera evni, ið samstundis verður tilskilað.

## VI. FRAMLØGA

**§ 10**
Í seinasta lagi 14 dagar frammanundan hvørjum aðalfundi verður at leggja fram á skrivstovu felagsins til eftirlit fyri partaeigararnar, dagsskrá og fullfíggjað uppskot, ið verða at bera fram á aðalfundinum, og til vanligan aðalfund eisini ársroknskapur.

## VII. FUNDARRÆTTUR OG ORÐSTÝRARI

**§ 11**
Atgongd til aðalfundin hava partaeigarar, ið eftir partabrævabókini við partabrævi, ið er innskrivað í bókina, kunnu prógva, at teir eru partaeigarar. Partaeigari kann skrivliga geva øðrum partaeigara fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.

**§ 12**
Aðalfundurin verður stýrdur av einum av nevndini valdum orðstýrara.

## VIII. ATKVØÐUGREIÐSLA

**§ 13**
**Stk. 1.** Á aðalfundinum verða øll mál at gera av við vanligum atkvøðumeiriluta.

**Stk. 2.** Til at samtykkja viðtøkur, ið miða ímóti broytingum av felagslógini ella avtøka av felagnum krevst tó, at í minsta lagi 2/3 av partapeninginum er umboðaður, og má viðtøka verða samtykt við 2/3 av teimum møttu atkvøðunum, umframt 2/3 av tí á

aðalfundi umboðaða partapeningi við atkvøðurætti.

Er hesin partapeningur ikki umboðaður, verður boðað til nýggjan aðalfund kunngjørt, sum í gr. 6 avgjørt, og á hesum fundi kann tá nevnda viðtøka við gildi samtykkjast við 2/3 av teimum møttu atkvøðunum, sama hvussu nógvir partaeigarar eru á fundi.

**§ 14**
Tá ið nýggjur aðalfundur verður hildin, samsvarandi 3. stk. í 13. grein, hava fulltrúir frá tí fyrra aðalfundinum gildi, eisini á hesum seinra aðalfundinum, uttan so, at tær skrivliga eru afturkallaðar fyri felagnum í seinasta lagi 4 dagar frammanundan tí seinra fundinum, ella partabrøvini ímeðan eru seld.
Tað, sum verður havt til umrøðu á aðalfundinum, verður ført í eina fundarbók, sum verður undirskrivað av orðstýraranum.

**§ 15**
Øll atkvøðugreiðsla fer fram skrivliga, uttan so at fundurin velur annan atkvøðugreiðsluhátt.

## IX. NEVNDIN

**§ 16**
**Stk. 1.** Í nevndini sita 3-6 nevndarlimir, valdir av aðalfundinum.

**Stk. 2.** Nevndin skipar seg við formanni og næstformanni.

**§ 17**
**Stk. 1.** Nevndin hevur fund so ofta formaðurin heldur tað vera neyðugt ella um ein av hinum limunum ynskir tað.

**Stk. 2.** Eingin avgerð kann verða tikin á nevndarfundi, uttan so at í minsta lagi 2/3 av nevndarlimunum eru á fundi.

**Stk. 3.** Fundarumrøður og viðtøkur verða skrivaðar í bók, sum verður undirskrivað av øllum á fundi.

**Stk. 4.** Nevndin hevur heimild at geva fulltrúarumboð.

## X. STJÓRNIN

**§ 18**
Nevndin setur eina stjórn við 1 ella fleiri limum.

## XI. TEKNINGARREGLUR

**§ 19**
Felagið verður bundið við undirskrift av allari nevndini ella formanninum saman við einum stjóra ella næstformanni saman við einum stjóra.

## XII. ROKNSKAPUR, GRANNSKOÐAN OG UMSITINGIN AV PENINGI OG BÝTIÐ AV ÁRSYVIRSKOTINUM

**§ 20**
Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

**§ 21**
Á hvørjum ári verður valdur ein grannskoðari, sum skal vera løggildur.

**§ 22**
**Stk. 1.** Nevndin skal ansa eftir, at felagsins ogn er neyðturvuliga umsitin og standa soleiðis, at hon er til mest gagn fyri tryggingartakaran, og soleiðis, at felagið altíð kann halda skyldur sínar.

**Stk. 2.** Við ársuppgerð skulu eisini verða gjørdar – eftir nevndarinnar ætli – neyðturvuligar avskrivingar og niðurskrivingar, sambært lóg.

Soleiðis samtykt á aðalfundi hin 09. apríl 2021.